UTTAN ÚR HEIMI

# Hann ætlar at leypa á skúlar og leikhús í USA

**Leiðarin hjá al-Qaeda í Irak, Abu Musab al-Zarqawi, hevur møguliga lagt ætlair um at søkja at málum í USA. Skúlar og leikhús kunnu vera ímillum málini**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Abu Musab al-Zarqawi verður hildin at vera leiðari fyri al-Qaeda í Irak, og nú fyrireikar hann kanska álop í USA*
*Mynd: Reuters*

Sambært tíðarritinum Time fingu amerikonsku myndugleikarnir í síðstu viku eina ávaring um, at tann kendi yvirgangsmaðurin Abu Musab al-Zarqawi kann hava lagt ætlanir um at søkja at sokallaðum "bleytum málum" í USA. Hetta eru mál sum skúlar, leikhús og matstovur.

Trygdarráðgevin í Hvítu Húsunum, Stephen Hardley, vildi ikki vátta tíðindini, men hann sigur við Time, at amerikonsku myndugleikarnir hava fingið ábendingar um, at al-Zaeqawi hevur knýtt tættari samband við leiðaran í al-Qaeda, Osama bin Laden.

– Vit vita, at al-Qaeda hevur søkt av málum sum skúlum, leikhúsum og matstovum fyrr, men enn vita vit ikki, um teir ætla at fremja slík álop her, sigur Stephen Hardley.

Sambært Time skal ein fyrrverandi viðhaldsmaður hjá al-Zarqawi hava sagt, at tað ber væl til at sleppa til USA at femja atsóknir, bara ein hevur nóg mikið av pengum við sær. Í Honduras ber til at fáa tey neyðugu pappírini, og haðani ber til at ferðast ígjøgnum Meksiko og norður um amerikanska markið, skal maðurin hava sagt.

Amerikanararnir siga seg vera vísar í, at al-Zaeqawi er í Irak, og at tað er hann, sum skipar fyri teimum flestu atsóknunum har. Amerikanararnir hava lovað stóra finningarløn, verður hann avdúkaður, men higartil hevur tað verið til fánýtis. Tað sama er galdandi fyri Osama bin Laden, sum sambært amerikanarunum fjalir seg onkunstaðni á markinum ímillum Afghanistan og Pakistan.

# Nýggj tøkni kann ikki bjarga veðurlagnum

**Tað fer at taka nógv ár at umleggja verandi orkuskipanir til nýggja tøkni, og tí kunnu vit ikki bíða eftir, siga serfrøðingar. Tí er neyðugt við tiltøkum nú fyri at tálma veðurlagsbroytingunum**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Umhvørvismálaráðharrarnir hjá ES samdust í síðstu viku um at seta nýggj mál fyri, hvussu nógv ídnaðarlondini skulu skerja luftdálkingina, eftir at Kyotosátmálin fer úr gildi í 2012.

Einstøk lond, teirra millum Danmark, skutu upp, at ES-londini skulu eisini fylgja við, hvat kemur burtur úr uppskotinum hjá amerikonsku stjórnini at finna nýggja tøkni, sum kann skerja dálkingina. Men umhvørviskommiserurin hjá ES, Stavros Dimas, sigur seg bera ótta fyri, at George W. Bush, forseti, ætlar sær at brúka tosið um nýggja tøkni sum umbering fyri at sleppa undan at gera nakað av tí, sum Kyotosáttmálin sigur.

– Tað hevði verið óført, um vit kundu loyst trupulleikarnar við veðurlagsbroytingunum við nýggjari tøkni, men tað letur seg ikki gera. Tað er neyðugt at skerja dálkingina nú. Vit kunnu ikki bíða eftir framtíðini, sigur Stavros Dimas við Politiken.

Danskir granskarar eru komnir langt við royndum at brúka brint sum brennievni til bilar, men danskir serfrøðingar eru samdir við Stavros Dimas í, at tað fara at ganga nógv ár, áðrenn tann nýggja tøknin fer at gera nakran mun. Bent Sørensen, professari á lærda háskúlanum í Roskilde og fyrverandi leiðari fyri donsku brintgranskingini, sigur við Politiken, at tað fer at taka ímillum 30 og 50 ár at broyta verandi orkuskipanir til at brúka brint.

Lesið Sosialin - so eru tit við

## Sektleiðari útflýggjaður

Myndugleikarnir í Argentina hava útflýggjað kilsku myndugleikunum tann 83 ára gamla týskaran Paul Schafer. Hann bleiv sendur við flogfari úr Buenos Aires til Santiago sunnudagin.

Paul Schafer er nazistur og hevur í mong ár verið leiðari í einari víðgongdari sekt í Kili. Myndugleikarnir har hava skuldsett hann kynsligan ágang ímóti børnum, og hann er eisini lagdur undir at hava samstarvað við fregnartænastuna hjá hernaðarstýrinum hjá Augusto Pinochet. Millum annað skal hann hava latið fregnartænastuna pína fangar á einum garði, sum sekt hansara átti.

Fyri nøkrum árum síðani hvarv Paul Schafer, men í síðstu viku varð hann tikin í Argentina. Tað var eitt sjónvarpslið, sum kom fram á hann. Kilsku myndugleikarnir siga, at sektin hevur framvegis umleið 280 limir, og at fleiri teirra eru eldri týskarar, sum hava búð í Kili seinastu 40 árini.

## Herða stríðið ímóti kongi

Teir maoistisku uppreistrarmenninir í Nepal hótta nú við at herða bardagan ímóti kongi og stýri hansara.

Í einari kunngerð í fleiri nepalskum bløðum um vikuskiftið stóð at lesa, at uppreistrarleiðslan hevur sent boð eftir nógvum ungum monnum til bardagan ímóti stýrinum. Sagt varð, at uppreistrarmenninir fara at steingja vegir, samstundis sum teir fara at leypa á mál hjá stýrinum. Eitt annað stig er, at tann 1. apríl verður skipað fyri aðalverkfalli.

Støðan í Nepal hevur verið sera spent, síðani Gyanendra, kongur, koyrdi bæði tjóðartingið og stjórnina til hús fyri fimm vikum síðani. Síðani hevur kongur sett landið í undantaksstøðu, og ymisk borgararættindi eru sett úr gildi. Uppreistrarmenninir vilja hava kong frá, og at Nepal verður skipað sum eitt kommunistiskt ríki.

## Vil ikki vera forseti

Í seinastuni hevur ljóðað, at amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, hevur havt ætlanir um at stilla upp sum republikanskt forsetavalevni í 2008, og at ætlan hennara var at gerast tann fyrsta kvinnan og tann fyrsti litti amerikanarin í forsetaembætinum.

Condoleezza Rice er væl umtókt í republikanska flokkinum, men í samrøðu við sjón-varpið ABC sunnudagin segði hon, at hon hevur ongar ætlanir um at royna seg sum forsetavalevni. Hon segði seg vera væl nøgda við starvið sum uttanríkisráðharri og tók uppaftur, at hon fer ikki at stilla upp til forseta.

Eygleiðarar í Washington siga, at nógvir amerikanarar fara kortini at spæla sær við tankan um, at hon fer at stilla upp í 2008. Fleiri halda, at Hillary Clinton, senatorur, fer at stilla upp fyri demokratarnar á næsta forsetavalinum, men eins og Condoleezza Rice hevur hon víst hesum aftur.

## Heiðursborgari vrakaður

Í 1933 bleiv táverandi týski nazistaleiðarin Adolf Hitler tilnevndur heiðursborgari í býnum Lindau, sum er tætt við tað eysturríkska markið.

Men nú hevur býráðið í Lindau samtykt at strika navn hansara av listanum við teimum, sum eru heiðursborgarar. Allir býráðslimirnir atkvøddu fyri. Annars var tað av tilvild, at býráðslimirnar varnaðust, at Hitler var ein av teirra heiðursborgarum, og avgjørt varð beinan vegin at taka heiðurin frá honum.

Í hesum døgum velja nógvir týskarar at hyggja at filminum "Der Untergang", ið snýr seg um Týskland undir seinna heimsbardaga. Tað fara tey kanska eisini at gera í Lindau, men býurin hevur í hvussu er sagt nazismuni farvæl nú, sigur borgarstjórin.